*<u>Røða hjá Sólvit E. Nolsø, landsstýrismanni, til ráðstevnuna um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu, í Lívdini 24. mai 2022</u>*

Vit hava í morgun hoyrt um, hví trivnaður er ein so umráðandi partur av fyribyrging. Tað hevur verið sera áhugavert at hoyra fakfólk á økinum greiða frá hesum sera týdningarmikla evni.

Á skrá nú seinnapartin hoyrdu vit um annað evnið, nevniliga "Hvussu hjálpa vit teimum, sum longu hava ein trupulleika?"

Hesi menniskju, sum hava tørv á hjálp, hava ofta ein saman settan tørv. Hetta krevur, at myndugleikar og stovnar arbeiða saman um at finna røttu loysnina fyri tað einstaka menniskja.

*

Vit hava longu nógvar ymiskar skipanir á almanna økinum. Tað kann verða trupult hjá borgarum og teirra avvarðandi at finna út av, hvar tey skulu venda sær og hvørja hjálp tey kunnu fáa.

Sum landsstýrismaður í almannamálum hugsi eg, at vit sum samfelag kunnu gera hetta betur!   Sum borgari skal verða lætt at finna út av, hvar kann ein kann venda sær fyri at fáa neyðugu hjálpina.

Av teimum ymisku skipanum, sum vit hava, vil eg her nevna tvær, sum eru tvørgeiraligar og tvørfakligar, nevnliga “Tann góða tilgongdin” og “Megna títt lív”.

*

Tann góða tilgongdin er skipað eftir einum leisti, sum tryggjar einari familju, sum hevur eitt barn við autismu, eina góða og samskipaða tænastu frá almenna geiranum. Samstarvið er millum almannaverk, heilsuverk, skúlaverk og kommunur, og har Almannaverkið hevur samskipandi leiklutin.

Ítøkiliga er talan um, at ein samskipari árliga  skipar ein netverksfund millum foreldur og teir ymisku geirarnir, sum hava við barnið at gera, alt eftir hvar barnið er í lívinum. Á hesum fundum verða tey evnið umrødd, sum foreldrini ynskja.

*

Í næstum verður ein eftirmeting gjørd av “Tí góðu tilgongdini”. Sum partur av hesi eftirmeting verður miða ímóti at víðka “Ta góðu tilgongdina”, til at fevna um aðrar diagnosur og sostatt geva fleiri borgarum ágóðan av hesi skipan.

Høvuðstankarnir aftanfyri “Ta góðu tilgongdina” kundu verið eitt gott amboð til at gjørt tað lættari hjá børnum, ungum og teirra avvarðandi at fingið hjálp, tá ið mistrivnaður vísir seg. Soleiðis letur hetta upp fyri at komi trupulleikanum til lívs, áðrenn hesi ungu koma í veruligar trupulleikar av rúsevnum.

*

Vit skulu eisini lofta teimum, sum eru komin í trupulleikar og her hava vit Megna títt lív. Eitt tvørgeiraligt átak, sum vit eisini hava hoyrt um fyrr í dag.

Megna títt lív er eitt bindilið millum hesar ungu borgarar við samansettum trupulleikum og myndugleikar og sum virkar við til, at borgarin fær hjálp til at megna sítt lív.

*

Hesar skipanir eru góðar og tiltrongdar, men tær krevja, at allir partar gera sítt fyri at samstarvið eydnast. Hetta krevur eisini at allir partar kenna seg hava eina ognarkenslu fyri uppgávuni, sum má lyftast í felag.

Takk fyri!